## Stórt átak ímóti mafiuni

Italsku myndugleikarnir hava tikið minst 68 fólk, sum eru undir illgruna fyri at vera uppi í teirri illa kendu Camorra-mafiuni í stórbýnum Napoli. Italska tíðindastovan skrivar, at løgreglan handtók 36, herurin 20, og at tann serliga fíggjarløgreglan tók tey seinastu 12. Tíðindastovan AP sigur seg hava fingið at vita, at fleiri av teimum fremstu mafiamonnunum í Napoli eru millum tey tiknu, og at leitað verður eftir nøkrum afturat. Ignazio La Russa, løgmálaráðharri, sigur, at tær seinastu handtøkurnar fara at raka tað ólógliga mafiavirksemið í Suðuritalia meint.



## Krevja endurgjald frá oljufelagi

Eitt eskimoarahúski í Prudhoe Bay í amerikanska statinunm Alaska vil hava 1,1 milliard krónur í endurgjaldi frá oljufelagnum British Petroleum. Húskið sigur, at bretska oljufelagið hevur brúkt teirra jørð í 40 ár og vil nú hava pengar afturfyri. BP og eskimoarahúskið høvdu eina avtaliu, men nú vil húskið vera við, at felagið breyt avtaluna, tá tað fór at bora eftir olju úti við strondina. Men leiðslan í BP avsannar, at felagið hevur brotið avtaluna, og BP heldur seg tí ikki skylda húskinum nakað og í øllum førum ikki nær námind tað, sum ´eksimoarahúskið krevur.

# Fjølmiðlar og samfelag

**- Hvønn týdning hevur tað fyri føroyska samfelagið, at vit hava dagbløð, útvarp og sjónvarp. Hetta er heitið á pallborðsfundi, sum verður í Miðlahúsinum í Vágsbotni fríggjakvøldið klokkan 19.30**

FJØLMIÐLAR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Fjølmiðlarnir rúma nógv í gerandisdegnum hjá mongum fólkum. Men hevur tað týdning fyri okkum og føroyska samfelagið, at vit hava bløð, útvarp og sjónvarp! Henda spurningin fer ljós at verða varpað á á einum pallborðsfundi í Miðlahúsinum í Vágsbotni fríggjakvøldið 22. mai klokkan 19.30.

Hans Engell, fjølmiðlamaður og viðmerkjari og fyrrverandi politikari og ráðharri í Danmark og fyrrv. blaðstjóri á Ekstrablaðnum fer at halda fyrilestur um týdningin fjølmiðlarnir hava sum heild. Hann verður so eisini við í einum pallborði, har hinir luttakararnir eru: Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi og fyrrv. sjónvarpsmaður og Tróndur Djurhuus, fyrrv. sjónvarpsstjóri. Orðstýrari er Jóannes Dalsgaard fyrrv. Deildarleiðari í Mentamálaráðnum. Tað er Miðlahúsið, sum skipar fyri tiltakinum, ið verður sent beinleiðis á Rás2. Tiltakið er alment.



*Hans Engell, fyrrv. blaðstjóri á Ekstrablaðnum*



*Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum*



*Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi og fyrrv. sjónvarpsmaður*



*Tróndur Djurhuus, fyrrverandi sjónvarpsstjóri*

# Støðan hjá donskum fjølmiðlum

FJØLMIÐLAR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Hvussu er støðan hjá donskum fjølmiðlum og her serstakliga dagbløðunum. Hetta evni verður tikið upp í eini sending á Rás2 Kristi Himmalferðardag frá kl. 14.15 til 16. Jan Müller hevur verið á fjølmiðlaráðstevnu í Danmark og tikið pulsin á donskum miðlum. Hann prátar við Ebbe Dahl, stjóra í Danske Dagblades Forening, Søren Knudsen, ábyrgdarblaðstjóra á Lolland Falster Tidende, Stig Ørskov, ábyrgdarblaðstjóra á Politiken og við Hans Engell, fyrrverandi blaðstjóra á Ekstrablaðnum.



*Ebbe Dahl, stjóri í Danske Dagblades forening saman við Søren Knudsen, ábyrgdarblaðstjóra á Lolland Falster Tidende*



*Stig Ørskov, ábyrgdarblaðstjóri á Politikken*